## Starvsfólk

Til skrivstovuna hjá Atlantic Airways í Kø-benhavns Lufthavn í Kastrup søkja vit eftir einum skrivstovu-/avgreiðslufólki at byrja 01. apríl 2000.

**Arbeiðið fevnir um:**
Ferðaseðlaavgreiðslu
Støðarbeiði
Fyrifallandi skrivstovuarbeiði
Nakað av bókhaldi

**Vit vænta at tú hevur:**
Kunnleika til AMADEUS bíleggingarskipan
Royndir úr ferðavinnuni
Góð samstarvsevnir
Evni til at arbeiða sjálvstøðugt og fjøltáttað
Góðan kunnleika til danskt og enskt.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. februar.

Atlantic Airways

Vága Floghavn • 380 Sørvágur
Att: Heri Niclasen

Lýsið í sosialinum


## Kunngerð

um upptøku av leysum djórum á almennari jørð í Tórshavnar kommunu.

Ikki er loyvt at hava hund, ross, seyð, gás, dunnu, hønu ella onnur djór gangandi leys á almennari jørð, t.e. á gøtu, vegi, breyt ella øki o.t., sum opin eru fyri vanligari ferðslu í Tórshavnar kommunu.

Leysgangandi djór verður upptikið á somu økjum.

Upptikið djór verður flýggjað ánara yrkadagar á Politistøðini antin kl. 9 á morgni ella kl. 5 seinnapart sambært avtalu, tá rindað er fyri upptøkugjald.

Politiið í Tórshavn
Tórshavnar býráð




## Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$

212380


## Grundskeið í boring

**Tíðarskeið: 6. mars – 17. mai 2000**

Grundskeið í boring er eitt ástøðiligt (teo-retiskt) skeið innan boritøkni. Skeiðið gevur ikki ein endaligan førleika at arbeiða innan borivirksemi, men gevur eina ástøðiliga upp-læring, ið saman við verkligari upplæring í teimum einstøku fyritøkunum gevur førleika til ymisk arbeiði sum t.d.

- tornarbeiði
- boridekksarbeiði

Skeiðið er ein fyrsta innføring í ymiskt bori-tekniskt arbeiði, og tað er sostatt eitt fyrsta stig á vegnum hjá teimum, sum ynskja at sleppa at arbeiða á hesum øki.

Skeiðið verður hildið í samstarvi við Sta-vanger maritime videregående skole, ið eis-ini stílar fyri skrivligu próvtøkuni. Skeiðið verður sostatt eisini góðtikið sum førleika-gevandi av OLF (Olieindustriens Landsfor-ening i Norge).

Skeiðsgjaldið er 10.000 kr, og fevnir tað um undirvísing, undirvísingartilfar, eina viku námsferð til Stavanger, har vitjað verður hjá ymiskum fyritøkum v.m. og eitt 5 daga trygd-arskeið. Lokið trygdarskeið er ein fyritreyt fyri at arbeiða í frálandavinnuni.

Ein fyritreyt fyri at innskriva seg til skeiðið er, at tú í minsta lagi hevur lokið SIT-út-búgving ella hevur samsvarandi kunnleika-støði. Viðkomandi verkligar royndir kunnu síðustillast við SIT-útbúgving.

Skeiðið verður hildið á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Seinasta freist at innskriva seg til skeiðið er 24. feburar, og faldari um »Grundskeið í boring« og innskrivingarblað fáast við at venda sær til ein av stovnunum, sum eru limir í Oljuútbúgvingarsamtakinum.

Meiri um skeiðið fæst at vita við at vitja heimasíðuna hjá Maskinmeistaraskúlanum (www.mec.fo) ella hjá einum av hinum skúl-unum, ella við at venda sær til Undirvísingar-og Mentamálastýrið, Falkavegur 6, Tórs-havn, tlf. 355050.

Tórshavn 28. januar 2000

**Oljuútbúgvingarsamtakið**

Oljuútbúgvingarsamtakið, ið er eitt samtak millum Tekniska Skúlan í Tórshavn, Tekniska Skúlan í Klaksvík, Maskinmeist-araskúlan, Føroya Sjómansskúla og Undirvísingar- og Menta-málastýrið, skipar fyri einum 7 vikur grundskeiði í boring í døgunum 6. mars – 17. mai 2000. Skeiðið endar við próvtøku.

# Stuðul frá FITUR

FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarvi millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.

Stuðul verður veittur innan hesi øki:

1. Ferðavinnuútbúgving
2. Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
3. Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m. Til dømis verður stuðul veittur til:
   - Ítróttafeløg
   - Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
   - Vinnufeløg
   - Mentunarfeløg
   - Kommunal samstarvsfeløg
   - Vinarbýir
   - Hátíðarhald
4. Samstarv millum flutningsfeløg
5. Marknaðarføring innan ferðavinnu

Umsóknir skulu stílast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

ella

**FITUR**
**c/o Ferðamálsráð Íslands**
**Lækjsrgata 3**
**IS-101 Reykjavík, Ísland**

*Seinasta freist at søkja er 28. februar 2000.*

*Í nevndini sita Petur Olivar í Hoyvík, nevndarformaður í Ferðaráð Føroya, Marita Danielsen, Flogfelag Føroya, Magni Arge, Atlantic Airways, Arnbjørg Sveinsdóttir, Steinn Lárusson, Icelandair og Gunnar Sigurdsson.*




»Gult ljós«

Nýtt skeið byrjar
7. feb. kl. 19

**Tvøroyra Teori- & Koyriskúli**
v/Áka Dimon
Tlf. 371180 & 286093
Koyrikort til persónbil & motorsúkklu

Sig... So Si al ur in
www.sosialurin.fo

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Sosialurin - 311820

FØROYA BETONG v/Hjaltur Tausen SAGING
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898





# Nýggj snið - serlig dygd!

NÝGGJ RØÐ






FLEIRI SELDAR Í FØROYUM

Ring og fá eitt maskinprát
Tlf. 422394 - 284792 - Fax 422395

Fígging heilt niður í 3,75% í rentu fæst

Sp/f O. K. HEILSØLA & MASKINUR
430 Hvalvík - Tlf. 422394






zarepta

# ZAREPTA-legurnar 2000

Um GUD vil, er ætlanin at hava hesar legur í Zarepta í Vatnsoyrum í summar:

| | | Frá: | Til: |
|---|---|---|---|
| Lega fyri brekað | | Hós. 18/5 | Sun. 21/5 |
| Familjulega I | | Ley. 27/5 | Frí. 2/6 |
| Familjulega II | | Ley. 3/6 | Frí. 9/6 |
| Familjulega III | | Ley. 10/6 | Frí. 16/6 |
| Familjulega IV | | Ley. 17/6 | Frí. 23/6 |
| Lega fyri einlig | | Frí. 23/6 | Týs. 27/6 |
| Summarlega I | (16-17 ár) | Ley. 1/7 | Frí. 7/7 |
| Summarlega II | (14-15 ár) | Ley. 8/7 | Frí. 14/7 |
| Summarlega III | (13 ár) | Ley. 15/7 | Frí. 21/7 |
| Summarlega IV | (12 ár) | Ley. 22/7 | Frí. 28/7 |
| Summarlega V | (11 ár) | Ley. 29/7 | Frí. 4/8 |
| Summarlega VI | (10 ár) | Ley. 5/8 | Hós. 10/8 |
| Summarlega VII | (9 ár) | Ley. 12/8 | Hós. 17/8 |
| Lega fyri 18 ár og eldri | | Hós. 17/8 | Sun. 20/8 |
| Familjulega V | | Sun. 20/8 | Ley. 26/8 |
| Bíbliuskeið | | Sun. 27/8 | Sun. 3/9 |
| Hjúnastevna I | | Frí. 8/9 | Sun. 10/9 |
| Hjúnastevna II | | Frí. 15/9 | Sun. 17/9 |
| Kvinnustevna | | Frí. 22/9 | Sun. 24/9 |
| Mansstevna | | Frí. 29/9 | Sun. 1/10 |
| Heystlega | (14-17 ár) | Frí. 6/10 | Mik.11/10 |



Nær tekningin fer fram verður lýst seinni.



## 2. skipari á Magnus Heinason

Starvið sum 2. skipari á fiskirannsóknarskipinum Magnus Heinason er leyst at søkja.

Umframt at føra skipið hevur 2. skiparin, saman við hinum á brúnni, ábyrgdina av, at skip og reiðskapur verða hildin í besta standi.

Eisini skal 2. skiparin vera við til at fremja tær kanningar og royndir, sum Fiskirannsóknarstovan leggur til rættis.

Løn og arbeiðstreytir eru eftir avtalu millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Fíggjarmálastýrið.

Fyrimun til starvið hava fólk við hægstu nautisku útbúgving og við royndum sum skiparar/yvirmenn við fiskiskipi.

Miðað verður ímóti, at skiparin tekur við starvinum 1. mars 2000.

Umsóknir við avritum av prógvum, viðmælum og frágreiðing um arbeiðsroyndir skulu verða Fiskirannsóknarstovuni í hendi innan 15. februar 2000.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bjarta Thomsen ella Hjalta í Jákupsstovu á Fiskirannsóknarstovuni.

Fiskirannsóknarstovan
Nóatún 1, Postrúm 3051
FO-110 Tórshavn
Tlf. 315092, Fax 318264




GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað



Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo

www.wenzel.fo

sosialurin -har tað hendir